## UTTAN ÚR HEIMI

## Ivast í evruni

Júst sum svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson, er farin undir eitt átak, sum skal fáa sviar at taka undir við evruni sum gjaldoyra, vísir tað seg, at altsamt fleiri sviar eru farnir at venda tí fremmanda gjaldoyranum bakið.

Fyri einum mánað síðani søgdu 45 prosent av svium ja til at fáa evruna til gjaldoyra ístaðin fyri krónuna, og tá vóru 39 prosent ímóti. Nú vísir ein kanning, at 43 prosent siga ja, men at onnur 43 prosent siga nei.

Í Ríkisdegnum taka allir teir borgarligu flokkarnir uttan Miðflokkurin undir við evruni. Tað sama gera sosialdemokratarnir, meðan stuðulsflokkarnir hjá stjórnini, Umhvørvisflokkurin og Vinstriflokkurin, eru ímóti. Hóast sosialdemokratiski flokkurin tekur undir við at seta evruna í gildi, eru fleiri limir á vinstravonginum í flokkinum ímóti at skifta gjaldoyra.

## Biður fólk goyma vápn

Bretsku bløðini The Times og The Independent vilja vera við, at irakski forsetin, Saddam Hussein, hevur biðið fleiri hundrað av sínum embætismonnum og onnur taka lutir av hópoyðingarvápnum við sær til hús og fjala teir har.

Bløðini siga seg hava fingið tíðindini frá bretskum stjórnarkeldum. Sambært teimum skal forsetin hava biðið embætismenn, granskarar og bøndur fjala týdningarmiklar lutir av ymsum hópoyðingarvápnum og ymsum kemiskum løgi. Gera teir ikki tað, kunnu teir fáa harða revsing, skriva bløðini.

The Times skrivar, at bæði Tony Blair, forsætisráðharri og George W. Bush, forseti halda tíðindini vera so álvarssom, at teir hava umhugsað at mæla iraksku embætismonnunum og granskarunum til at siga ST-vápnaeftirlitsmonnunum frá, goyma teir slík vápn við hús.

## Væl vitjað torn

Á hvørjum ári fara seks milliónir fólk upp í Eiffeltornið í París, sum sambært býarmyndugleikunum er tað best umtókta frítíðarstaðið í heiminum.

Tornið varð bygt í 1889, og 94 ár seinni høvdu 100 milliónir fólk verið uppi í tí. Men so kom ferð á, og eftir 19 árum høvdu onnur 100 milliónir ferðafólk verið uppi í torninum. Sostatt hava 200 milliónir fólk nú verið uppi í Eiffeltorninum.

Varaborgarstjórin í París, Jean-Bernard Bros, sigur, at tey fara ikki at peika á eitt ávíst ferðafólk sum vitjandi nummar 200.000.000. Heldur verður skipað fyri einum felags hátíðarhaldi fyri øll tey vitjandi sigur hann og leggur afturat, at hátíðarhaldið verður samstundis ein tøkk til ferðavinnuna.

## Seinur postur

Týsdagin fekk norðmaðurin Finn-Erik Vinje eitt bræv frá fastur síni. Tað løgna var, at fastur hansara doyði fyri meiri enn 30 árum síðani.

Slagorðið hjá norska postverkinum er annars, at posturin kemur fram til ta ásettu tíðina, men hetta má so vera eitt frávik. Brævið, sum Finn-Erik Vinje fekk týsdagin, er stemplað í Oslo tann 29. september í 1968. Á tí eru tvey frímerki, eitt 60 oyru- og eitt fimm oyrufrímerki. Tað sæst á brævinum, at tað kom á posthúsið í Haslum tann 5. oktober í 1968, og at postfólkini síðani hava fingið trupulleikar við at finna móttakaran. Tann 9. oktober í 1968 er tann seinasti bústaðurin skrivaður uttan á brævið, men síðani hvørva øll spor.

Týsdagin lá brævið brádliga í postkassanum hjá Finn-Erik Vinje, og í postverkinum duga tey ikki at skilja, hvat er hent. Tey noyðast í hvussu er at ásanna, at hesaferð kom posturin ikki til ta ásettu

# Rakettin – tað nýggja yvirgangsvápnið

**Tað einasta óvæntaða við yvirgangsatsóknini í Kenya var, at tær báðar rakettirnar raktu ikki tað ísraelska ferðamannaflogfarið**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*



*Tær báðar SAM-7-rakettirnar raktu ikki hetta ísraelska flogfarið, tá tað fór á flog úr Mombasa, og tað var tað einasta óvæntaða við atsóknini*

*Mynd: Reuters*

Tær smáu rakettirnar eru ein álvarssom hóttan ímóti sivilu flogferðsluni, men myndugleikarnir royna at tosa sum minst um vandan, tí tað er at kalla ógjørligt at gera nakað við hann.

Serfrøðingar í flogferðslutrygd hava leingi bíðað eftir, at yvirgangsmenn fara at skjóta rakettir eftir fullsettum ferðamannaflogførum. Hósdagin skutu teir tvær rakettir av sovjetska slagnum SAM-7 eftir ísraelska ferðamannaflogfarinum í Mombasa, og sambært eygnavitnum fóru rakettirnar bara fáar metrar fram við flogfarinum. Tað eru ikki bara gamlar sovjetskar rakettir, ið kunnu nýtast til slíkar atsóknir. Bæði USA og Frakland hava gjørt nógvar slíkar rakettir. Tær bera millum tríggjar og fýra kilometrar og flúgva skjótari enn ljóðið.

Longu í nítiárunum ávaraði amerikanska uttanríkisráðiðum vandan fyri, at yvirgangsmenn kundu fara at nýta smáar rakettir ímóti ferðamannaflogførum, og hósdagin avdúkaðu franskir fjølmiðlar, at umboð fyri 25 tey størstu flogfeløgini í heiminum høvdu havt loyniligan fund í Washinton fyrr í hesum mánaðinum. Evnið var júst vandin fyri rakettálopum.

Franski yvirgangsserfrøðingurin, Jean-Luc Marret, sigur, at tað einasta óvæntaða við atsóknini í Mombasa hósdagin var, at rakettirnar raktu ikki tað ísraelska flogfarið. Hann heldur, at annaðhvørt dugdu menninir ikki at fáast við rakettirnar, ella virkaðu rakettirnar ikki, sum tær skuldu.

At vandin fyri slíkum álopum er stórur, eru serfrøðingarnir ikki í iva um. Víst verður á, at í Afghanistan hava amerikanararnir lagt hald á 6.000 tílíkar smáar rakettir, og spurningurin er so bert, hvussu nógvar ikki eru funnar.

Samstundis vísa serfrøðingarnir á, at tað er trupult at verja seg ímóti slíkum álopum. Trygdin í floghavnunum dugir ikki, tí yvirgangsmonnunum nýtist ikki at sleppa fram at flogførunum fyri at søkja at teimum. Teir kunnu sita fleiri kilometrar frá floghavnini við rakettini á økslini.

# Í deyðan fyri nýskipanir

**Í Iran er Hashem Aghajari dømdur til deyða, tí hann hevur mælt prestastýrinum til at fara undir politiskar nýskipanir. Hann kann skjóta dómin inn fyri hægri rætt, men vil ikki**

MANNARÆTTINDI
*Árni Joensen*

Hashem Aghajari slakar ikki. Hann vil heldur fara í deyðan enn at slaka fyri einari konservativari islamskari rættarskipan, sum hevur dømt hann at verða hongdur, tí hann hevur mælt prestastýrinum til at fara undir nýskipanir.

Týsdagin kunngjørdi ákæruvaldið, at tað heldur fast um deyðarevsingina, men at Aghajari hevur møguleika at skjóta dómin inn fyri hægri rætt. Tað skal hann gera í seinasta lagi tann 3. desember, men mikudagin segði verji hansara, dómurin verður ikki royndur í einum hægri rætti. Sambært verjanum er Aghajari sannførdur um, at úrskurðurin hjá rættinum er politiskur.

Eygleiðarar í Iran siga, at málið um Hashem Aghajari hevur stóran áhuga í landinum, og at vandi er fyri ófriði í landinum, verður deyðadómurin fullførdur.

Tí Hashem Aghajari er ikki hvør sum helst. Hann var hermaður í iranska herinum í krígnum við grannalandið Irak í árunum frá 1980 til 1988, har hann misti annað beinið. Hann er í dag professari á einum læraraskúla í høvuðsstaðnum Teheran og limur í einum vinstrasinnaðum politiskum felagsskapi, sum hann eisini umboðar í tjóðartinginum.

Rættarmálið, sum endaði við deyðadómi, var fyri afturlatnum hurðum og elvdi alt fyri eitt til fleiri mótmæli. Millum teirra, sum mótmæltu, var Nasser Qavvami, sum er formaður í lógarnevndini hjá iranska tjóðartinginum. Hann segði, at professarin hevur ikki gjørt ella sagt nakað, sum kann hava revsing við sær og allarminst deyðarevsing. Teir iransku studentarnir mótmæltu eisini, og fyri fyrstu ferð í trý ár vóru mótmælandi studentar í túsundatali at síggja í gøtunum í Teheran. At enda kendu myndugleikarnir seg noyddar at senda vælmannað løgreglulið at reka studentarnar úr gøtunum, men tað merkir ikki, at mótmælini eru tagnað.

- Myndugleikarnir spæla við eld. Støðan á teimum lærdu háskúlunum er ógvuliga spent, og hetta kann lættliga enda við ógvusligum ófriði, sigur politiski eygleiðarin Saeed Laylaz.

Málið um Hashem Aghajari er bert ein liður í valdsstríðnum millum tað konservativa prestastýrið og tann nýskipanarhuga forsetan Khatami. Verður deyðadómurin fullførdur, er vandi fyri, at stríðið í Iran verður av einum øðrum slagi enn nú, siga eygleiðararnir.

ítróttur

Nr. 231 • leygardagur • 30. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kyndil vil hevna seg




*Kyndil fekk bank, tá tað varð lagt upp til stórdyst í Vestmanna fyri knøppum mánaði síðani, og síðani hava teir ikki vunnið. Ætlanin er tó helst, at vend skal koma í aftur, nú VÍF vitjar í Havn*

**Seinasti stórdysturin millum VÍF og Kyndil endaði við stórsigri til VÍF, og nú vilja teir í Kyndli ivaleyst hevna seg**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Niðurtúrurin, sum besta mansliðið hjá Kyndli upplivir í løtuni, tók sína byrjan, tá teir fyri knøppum mánaði síðani fingu bank í Vestmanna. Hetta hendi, júst sum Kyndil var í ferð við at prógva, at teir nú aftur skuldu teljast millum styrkisfaktorarnar í føroyskum manshondbólti.

Síðani tapið í Vestmanna hevur Kyndil bert fingið eitt stig, og tað er einki at ivast í, at teir tí fegnir vilja fáa okkurt slag av hevnd, nú VÍF kemur til Havnar á vitjan.

Tað verður tó ikki bara sum at siga tað hjá Kyndli. Gaman í fekk VÍF ein fyribils frammaná, tá teir seinasta vikuskifti taptu fyri StÍF, men sum tað hevur gingið seinnu árini, so munnu vestmenningarnir nú vera vanir við, at StÍF ger teimum fortreð av og á. Hinvegin hevur VÍF í aðrar mátar sýnt sera støðug avrik seinasta mánaðin ella so, og kunnu teir aftur finna fóttafesti frá teimum dystunum, so er vanliga ikki gott at vera fyri.

Tað eru tó ikki bara Kyndil og VÍF, sum spæla hondbólt um vikuskiftið. Burtursæð frá Neistanum, sum hevur frí hetta vikuskiftið, so skulu øll hini liðini í eldin.

Á Skála hevur oddaliðið úr StÍF ein á pappírinum léttan dyst, tá hoyvíkingar koma á vitjan. Við sigrinum á VÍF seinasta vikuskifti legði StÍF seg aftur einsamalt á odda í deildini, og tað er lítið, sum bendir á, at hovyíkingar skulu broyta um hetta. H71 vann teir báðar fyrstu dystirnar á árinum, men síðani hava teir verið púrasta sørir. Hinvegin var støðan eisini hin sama, tá Tjaldur vitjaði StÍF næst seiansta umfar. Tá hevði Tjaldur einki stig, men teir vunnu kortini á oddaliðnum, so hóast strandingar eru greiðir favorittar, so kann ein sensatión ikki útilokast.

Í Hoyvíkarhøllini kemur Tjaldur á vitjan hjá KÍF, og nógv bendir á, at hetta kann gerast ein sera spennandi dystur. Fyrstu umførini vóru hesi bæði liðini tey, sum høvdu minstu úrtøkuna, men sum vikurnar hava gingið, er annað skil komið á. KÍF fekk við útlendsku leikarunum neyðuga íblásturin til at kunna hótta hini liðini, og seinastu tvey umførini hevur Tjaldur prógvað, at teir heldur ikki eru so léttir at syfta.

# Spenningur á øllum leikstøðum

**Oddaliðið skal hesa ferð vitja á Skála, meðan kappingarneytarnir úr VÍF hava útidyst móti einum stigasvongum Kyndils-liði**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og hjá monnunum, so verður talan um tríggjar dystir í bestu kvinnudeildini í hondbólti hetta vikuskiftið.

Størsti spenningurin er kanska um, hvussu tað man fara at tørna út hjá teimum báðum liðunum, sum nú tykjast hava lagt seg ovast í deildini. Har hevur VB hildið til frá fyrsta leikdegi, og enn er einki av mótstøðuliðunum, sum hevur megnað at staðið teimum kurl. Heldur ikki StÍF, hóast VB noyddist at vera ein av týdningarmestu leikarunum fyriuttan, tá liðini hittust í Vági, og grundað á hetta er VB uttan iva favorittur á Skála sunnudagin.

Hinvegin hevur StÍF fleiri ferðir í ár sýnt, at um lagið er hitt rætta, so kunnu tær spæla upp við flestu liðini í deildini. Enn hevur neyðugi stabiliteturin ikki verið til staðar, men tað kundi bent á, at eitt nýtt stólið er í stoypiskeiðini, og raka tær røttu tangentarnar, so kann væl vera, at VB fær sína kanska truplastu uppgávu higartil í ár.

### VÍF má fylgja við

Av hinum liðunum í deildini tykist tað langt um leingi so, at VÍF hevur átikið sær leiklutin sum kappingarneytin hjá VB. Meistararnir tey bæði seinnu árini hava havt sína tíð um at koma ígongd, men avrikini seinastu vikurnar hava bent á, at gullspælið so spakuliga er um at koma framaftur. Nakað sum eisini er neyðugt, um tær skulu gera sær vónir um at fanga VB-liðið aftur, nú tær longu eru farnar í út

Seinasta tapið hjá VÍF var fyri júst Kyndli, men síðani hevur gingið hvør sín veg. Kyndil hevur enn ikki funnið neyðuga støðufestið til at standa seg yvir longri tíðarskeið, og eitt nú hava tær ikki vunnið síðani dystin í Vestmanna. Avrikini hava sveiggja millum nakað av tí besta og nakað av tí vánaligasta spælinum í deildini, og so er spurningurin, hvussu verður hesaferð.

Seinasti dysturin verður í Klaksvík, har Tjaldur kemur á vitjan. Leingi sá út til, at hesi skuldu gerast tey bæði niðastu liðini í deildini, men seinastu vikurnar hevur Stjørnan tó togað seg nakað rætta vegin. Fyri viku síðani lyftu tær seg upp á miðjuna á stigatalvuni við sigri á júst Tjaldri, og so er spurningurin, hvørt klaksvíkingarnir kunnu endurtaka hetta og koma heilt nær heiðursmerkjaplássunum, ella um Tjaldur hesa ferð er drúgvari, soleiðis at fjarstøðan úr botninum og upp minkar.